Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 7 |
| Tíð: | 06.05.2021 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

Tað lá ikki fyri hjá Katrini Holm at møta. Í hennara stað møtti Ingigerð á Trøðni, fyrstvaldi varalimur.

**Fundarskrá:**

1. Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn
2. Evni til fund við borgarstjóran tann 26. mai.
3. Túrur til Vágs
4. Ymiskt

AD 1 Góðkenning av seinastu fundarfrásøgn

Fundarfrágreiðing #6 var góðkend.

AD 2 Evni til fund við borgarstjóran tann 26. mai

Fundurin við borgarstjóran verður 26. mai 2021 klokkan 14 í Ingólfsstovu.

Evni, sum hava okkara áhuga, eru mong í tali, men á hesum fundi hava vit valt at avmarka tað, vit ætla at tosa um, til hesi 4 evnini:

1. Tilhaldið opið og lyfta eigur at finnast í bygninginum, tí sum er, eru atkomumøguleikar ikki nøktandi.
2. Íbúðarbygging. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur kommunan um bygging av íbúðum?
3. Bússkýli og benkur mangla.
4. Tættari tilknýti til Heilsu- og eldranevndina og Trivnaðarnevndina við føstum fundum.

AD 3 Túrur til Vágs

Vitjanin til Vágs er settur at vera 10. juni 2021. Vit hitta umboð fyri Vágs kommunu og vit hitta forkvinnuna í Vágs pensjónistafelag.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Eldraráðið miðar fram ímóti, at fyrsta kvøldsetan hjá Eldraráðnum í Tilhaldinum verður hóskvøldið 26. august 2021.
Og annars kundu vit gleðast um at umlættingarheimið URD er tikið í nýtslu. Ein stásiligur og nýmótans bygningur, har mistir førleikar kunnu mennast aftur.

Næsti fundur verður hósdagin 20. mai klokkan 13 í Tilhaldinum. Sigi frá í góðari tið, um tað ikki liggur fyri at møta.

Fundur lokin klokkan 14:30

Tórshavn 6 mai 2021.

Petur Rouch,
skrivari